**LISA. Vaktarskifti er á listarliga økinum. Bæði starvsnevnd og skrivari eru farin frá og nýggj nevnd komin til í Listafólkasambandi Føroya. Fyrstvaldi nevndarlimur er Jenny Petersen og afturat henni teir báðir Oddfríður Marni Rasmussen og Jens Frederiksen. Fyrsta uppgávan er at finna nýggjan skrivara fyri Maluna Johannessen, sum hósdagin byrjaði aftur í gamla starvinum í Sjónvarpinum.**

# Hvør verður formaður?



*– Fram ríður Oddfríður…*

MENTAN
*Birgir Kruse*

Á eykaaðalfundi hin 21. februar var øll starvsnevndin í Listafólkasambandi Føroya skift út. Tey trý í nýggju nevndini hava longu havt fund, men ikki fyrr enn hósdagin í næstu viku verður sjálvt vaktarskiftið. Tá fer gamla nevndin frá og hin nýggja tekur við.

Hósdagin verður eisini kunngjørt, hvussu nevndin skipar seg, frættist frá fundi, sum var mikukvøldið.

Higartil hava tey trý, sum hava sitið í nevndini umboða tónleikin og arkitekturin. Brandur Øssursson og Sharon Weiss eru bæði kend innan ávikavist jazz og fólkatónleikin, meðan formaðurin Jórun í Dali, er arkitektur og sostatt umboðar Arkitektafelag Føroya í Listafólkasambandinum.

Nývalda starvsnevndin er mótvegis hinari fráfarnu sett saman av tveimum monnum og einari kvinnu. Fyrstvald er Jenny Petersen, sum er kend úr sjónleikarahøpi bæði her í landinum og úr Noregi. Hon er í starvi hjá yrkissjónleikarabólkinum Grímu í gamla Meiarínum í Havn. Jenny Petersen umboðar sostatt Leikarafelag Føroya í Listafólkasambandinum hetta komandi skeiðið. Jenny er úr Havn og sum hon segði í skemtiligari útvarpssending fyri stuttum, so er áhugin fyri sjónleiki ikki óvæntaður. Eisini pápin, Kári Petersen, hevur verið nógv at sæð á pallinum í Sjónleikarhúsinum. Hann er við í aktuella várskemtinum á júst hesum palli.

Nývaldu menninir í Listafólkasambandinum eru Oddfríður Marni Rasmussen og Jens Frederiksen.

Oddfríður, sum er ættaður heiman av Sandi, er rithøvundur og fekk í heyst einastu bókmentavirðisløn okkara, virðisløn M. A. Jacobsens. Oddfríður hevur givið út fleiri yrkingasøvn og hevur sum einasti føroyingur útbúgving frá Forfatterskolen í Danmark.

Í vetur hevur hann við hepnari hond undirvíst á Føroya Fólkaháskúla í kynstrinum at skriva undir heitinum »liva-skriva«. Oddfríður umboðar Rithøvundafelag Føroya í nývaldu starvsnevndini í Listafólkasambandinum.

Jens Frederiksen, sum er ættaður úr Danmark, er listamaður og listaummælari. Hann starvast dagliga sum lærari í Studentaskúlanum í Hoydølum og umboðar Felagið føroysk Myndlistafólk. Jens er eisini tiltakslimur í úrvalsnevndini hjá sama felagi, ið júst nú velur út listaverk til árligu Várframsýningina í Listaskálanum. Henda framsýning letur upp næsta leygardag.

Hvør av hesum trimum verður formaður í Listafólkasambandi Føroya, ella LISA, sum sagt verður í dagligari talu, er enn ikki greitt. Í stuttari viðmerking eftir nevndarfund mikukvøldið verður sagt, at hósdagin í komandi viku verður tíðindafundur.

»Samstundis sum hin nevndin fer frá, traðka vit til. Og tá verður sagt um hvussu og hvørjum tann nýggja nevndin fer at arbeiða við«.

So mentunarliga tilvitskan má leggjast í dvala til næsta hósdag klokkan 15. Tað verður spennandi. Orsøkin til henda spenning finna vit í, at meðan fyrrverandi nevndin hevur umboða arkitektur og tónleik, fer nývalda nevndin at umboða leiklist, bókmentir og myndlist. Soleiðis beint eftir nevndarsessunum og sæð í mun til teir felagsskapir tey koma úr, sum tað sæst á nýggju heimasíðuni hjá felagsskapinum www.lisa.fo

Heimasíðan er eitt hent amboð, verður hon brúkt og javnan dagførd. Nýggja nevndarvalið er longu lagt út á síðuna, eins og lesast kann um altjóða tiltøk av mentunarligum slagi. Eisini er síðan interaktiv, so brúkarar kunnu leggja ymiskt inn á hana.

Í samrøðu við fráfarna skrivaran her í blaðnum varð staðfest, at eitt av aðalmálunum hjá LISA er at arbeiða fyri fáa til vega karmar, sum føroysk listafólk kunnu trívast og virka í.

Í hesum sambandi nevndi Malan Johannessen, fyrrverandi skrivari, at mentanarnevndin hjá Løgtinginum eitt nú vildi hava felagsskapin at gera viðmerkingar til uppskotið um Mentanargrunn. Grunnurin er farin til verka við Róa Paturssyni sum formanni og Paulivar Andreassen sum skrivara. LISA er umboðað beinleiðis í hesi nevnd. Júst í hesum døgum viðger nevndin í Mentunargrunni Landsins á fyrsta sinni 37 umsóknir um starvsløn til føroysk listafólk. Samlaða upphæddin til hetta endamál er hálv onnur millión, ella tilsamans 84 mánaðir.

LISA hevur eisini skyldu til at manna ymsar aðrar nevndir. Eitt nú er felagið umboðað í nevndini, sum letur stóru Mentunarvirðislønina hjá landinum, men eisini í privatu nevndini, sum letur gávugóðs og møguligan stuðul úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum, sum herfyri læt Rannvá P. Kunoy fyrsta gávugóðsið.

Samanumtikið hevur LISA altíð eitt tætt samstarv við Mentamálastýrið og tað sum har fyriferst. Eisini hevur felagsskapurin samstarv við líknandi feløg í øðrum londum og rekur egna skrivstovu á ovastu hædd í Skansastovu, yvir við Strond í Havn. Skrivstovuhaldið verður fíggjað við játtan á fíggjarlógini.

Sosialurin ynskir nývaldu starvsnevndini í Listafólkasambandi Føroya góðan byr hetta komandi skeiðið.



*– Biðla við Jenny …*



*– Ella verður tað Jens Edilingur?*

*Myndir: Jens K. Vang.*



**GAMLI SLOAN. Vekingarrørslan, sum William Sloan kom við til Føroya í 1860´unum var eingin politisk rørsla. Tvørturímóti. Men tað skerst kortini ikki burtur, at viðurskifti hennara við ein tann rótgrónasta, viðtøkasta og sterkasta stovnin hjá donskum yvirvaldi í Føroyum á avgerandi hátt var við til at skapa tann iva og kanska áræði við hjá vanligum fólki, ið var neyðugur til at skipa seg politiskt móti donskum yvirvald. Og tað var jú fyritreytin fyri, at sjálvstýriskravið kundi fáa høvdið fyri seg í føroyska samfelagnum, sigur Carl Johan Jensen, rithøvundur, í hesi hugleiðing um tjóðskap og sjálvstýri**

# Tjóðskapur og sjálvstýri

HUGLEIÐING
*Carl Johan Jensen*

Eitt sum javnan verður havt á lofti í kjakinum um framtíðarstøðu Føroya – og helst í tí slættligara endanum – er, at sjálvstýrisstrevið bæði nú og fyrr stendur á einari, um ikki deyðari, so ið hvussu er trænaðari rót, men tað er tjóðskaparhugsjónini. Henda hugsjón fekk so smátt røtur undir seg á okkara berligu klettum í tíðini eftir, at einahandilsskipanin varð avtikin og samfelagið skifti ham frá at vera eitt mentunarliga fast skorðað bóndasamfelag til at vera eitt nútíðarligt fiskivinnusamfelag, har grundirnar vóru farnar at rembast undir sjálvstilvitinum hjá fólkinum. Tað er eingin ivi um, at tjóðskaparrørslan, henda rørslan, sum m.a. Hans Jacob Debes professari hevur lýst í doktararitgerð síni »Nú er tann stundin...« (1982) hevði støði fyrst og fremst í romantiskari fagurspeki og hugmyndum hennara, sum knýttu tjóðskapin óloysiliga at máli og mentan. Tá ið tjóðskaparrørslan av fyrstan tíð ger vart við seg í føroyska studentaumhvørvinum í Keypmannhavn, kemur hon tískil fram í skaldskaparlíki, í seinromantiskum yrkingum og sangum, sum í størri og minni mun eru kveikt av einari tregablandaðari kenslu fyri føroyskum máli og mentan og teirri vanlagnu, teimum er vís í eini samtíð, ið eyðkennist av eirindaleysari broyting og órógv.

Tjóðskaparrørslan kyknaði, eins og Jørgen Frantz Jacobsen skrivar í eini grein frá 1936, sum eitt kenslulag, sum ein romantisk upplyftan. Tá ið rørslan síðani tekur seg upp her heima í Føroyum og tann tiltikni fundurin annan jóladag 1888 verður hildin, er uppstøðan enn tann sama. Høvuðsdenturin liggur, sum tikið verður fram í innbjóðingini til Jólafundin, á at »verja Förja mál og Förja siðir«. Tjóðskaparrørslan er sostatt fyrst og fremst eitt móttiltak móti teimum viðurskiftum, ið skapast av vinnulívsgongdini í Føroyum eftir einahandilsavtøkuna og ljóðbotnur hennara eru eina helst tey, ið umboða tað valdið í Føroyum, sum var treytað av og hekk á, at aldargomul kor og lívslag varðveittust, eg hugsi eitt nú um bøndur, prestar og tann partin av embætisveldinum, sum føroyingar høvdu hevdað sær eitt nú sýslumansembætini. Í nógv minni mun var rørslan eitt tiltak, sum vendi sær ímóti teirri politisku skipanini. Rørslan er spakfør í krøvum sínum, næstan eyðmjúk og tað verður í heilum tikið fram og strikað undir at »at man ikke ville det danske Sprog eller Danskerne til livs«, ið hvussu tað so skuldi borið til.

Kortini hevur tað verið og er enn vanlig hugsan bæði hjá leikum og lærdum, at tjóðskaparrørslan er tann grund, ið alt sjálvstýrisstríð í Føroyum, síðani 1889 hevur bygt á. Tjóðskaparrørslan sáddi, verður sagt, tann fyrsta ivan um danskan myndugleika í Føroyum, tann ivan, sum í tjúgundu øld vaks til eina politiska samtak móti donskum ræði í Føroyum og m.a. førdi til, at vit vórðu loyst úr amtshaftinum eftir annan heimsbardaga.

Men er tað nú heilt beint?
Sjálvur ivist eg.

Ikki fyri tann skyld, at eg vil tvørtaka fyri, at tjóðskaparkensla eins og vit t.d. kenna hana úr Føroya Fólks sangbók hevur verið ein umráðandi táttur í at lagfesta føroyskt sjálvstilvit, ið teirri roksamu øld, sum nústani er afturáløgd. Politiskan týdning afturímóti hevur hon yvirhøvur bert havt í tann mun danskir myndugleikar, ið varðaðu av Føroyum, illa ella als ikki skiltu ella vildu skilja, at viðurskiftini her vóru onnur enn í Danmark. Danskir politikkarar og myndugleikar hildu leingi (og halda fyri ein stóran part enn), at tað bar til at seta føroyingum somu kor, sum øðrum donskum borgarum í einum og øllum og hildu t.d. tvørliga upp á, at skúlaskapur í Føroyum ikki kundi skipast øðrvísi enn í Danmark. Tað bøtti heldur ikki um, at embætisveldið og ein sjáldsama bakrógvin sambandsflokkur, ið frá 1906 og langt fram í tretivu árini at kalla høvdu alt tað politiska og fyrisitingarliga valdið í hondum, illa dugdu á at skyna, hvat, ið var í gerð í samtíðini, men hildu, at danska ríkið ikki bert kundi stuðla undir framvøkstur í Føroyum, men beinanvegin skuldi bera føroyingum hann uttan, at nakað fór av lagi hjá teimum sjálvum og uttan at tað kostaði nakað. Soleiðis sum alt sostatt lá fyri bæði í Føroyum og við hugburðinum hjá donskum myndugleikum, var einki at undrast á, at føroyskur tjóðskapur kom í eina støðu, sum bæði var tvørsagnarkend og hugstoytt. Politikkarar, ið vóru tí at vísa seg óvikandi og stívrenda danska valdinum hollir, vaktu eitt mistreysti upp hjá einum stórum parti av tí føroyska fólkinum ið so við og við vendi sær illkennandi frá sínum egna og at enda við eini sovorðnari lítilsvirðing, at tað mátti elva til stríð og í flestu førum óneyðugt stríð, eitt nú um skúla- og kirkjumál. Hetta stríðið armaði tað politiska lívið Føroyum út í tjúgunum og mest øll tretivuárini við. Tað eru í høvuðsheitum tvær megingrundir til, at eg ikki haldi, at tað er rætt at siga, at tjóðskaparrørslan einsamøll var jarðarbotnur fyri sjálvstýrisstríðnum.

Í fyrsta lagi var rørslan ikki, sum mangan verður hildið fram, ein alfólkalig, men eins og sipað til í áðni, ein borgarlig mentamannarørsla, ið verri enn so øll hildu seg hava áneyðir at taka støðu til. Undirtøkan rørslan fekk millum fólk var eisini avmarkað og datt eftir rættiliga stuttari tíð niður í einki. Longu fyrst í farnu øld steðgar tað virksemið, ið hon íbirti, eitt nú blaðútgávan. Tað sum livdi eftir av rørsluni síðani stirvnaði sum frá leið og hon hevur ongantíð aftur heldur evnað at gera seg leysa við longsulin eftir tí farna ella við gamlar og útgingnar hugsjónir.

Í øðrum lagi eru tjóðskapur og sjálvstýrisstremban ikki endiliga atvold og fylgja í somu tilgongd. Dømi um tað eru eitt nú Australia, ið fekk fullveldi í 1904, Nýggja



*William Sloan kom til Føroya fyrstu ferð miðskeiðis í 1860´unum og eitt av tí, sum eyðkendi boðskap hansara og eisini sermerkir vekingarrørslur eitt nú Bretlandi í 19. øld, var andstøða móti læruni hjá ríkiskirkjuni. Myndin er tikin í 1911, tá Sloan var 73 ára gamal*





*Í tí gamla føroyska samfelagnum, sigur Kristian Osvald Viderøe – og tað staðfesta aðrar keldur við –, var kirkjan álitið hjá fólkinum og hjartað í bygdalívinum. Virðingin fyri kirkjuni og myndugleika hennara var ósvikalig og treytaleys*